# Kringvarp Føroya søkir stjóra

**Starvið**
Stjórin hevur dagligu programmábyrgdina og røkir fyrisitingarligu og búskaparligu leiðsluna av Kringvarpi Føroya, sum er skipað eftir løgtingslóg nr. 61 um kringvarp frá 16. mai 2006 við seinni broytingum.

**Umsøkjarin**
Sum stjóri ert tú álitisvekjandi, setir trúvirði í hásæti og er tann, ið myndar stovnin alment.

Tú hevur viðkomandi leiðsluroyndir, viðkomandi miðallanga ella langa útbúgving og fyrimunur, um tú hevur miðlaroyndir.

Tú eggjar til eldhuga, ert savnandi, megnar at fylgja settum málum og halda kósina.

Tú hevur innlit í føroyska mentan, samfelagsviðurskifti, greiða fatan av public service uppgávum Kringvarpsins og tryggjar eitt fakliga høgt støði á stovninum.

Tú hevur grundleggjandi fatan av fyrisitingarliga og fíggjarliga rakstrinum av einum stovni.

**Setanarviðurskifti**
Starvið, ið er áramálssett í fimm ár, er lønt samsvarandi 38. lønarflokki í avtalu millum Tænastumannafelag Landsins og Fíggjarmálaráðið, tó uttan at verða tænastumannastarv. Grundlønin er eftirlønargevandi. Afturat hesum verður latin ein ikki eftirlønargevandi viðbót fyri áramálssetan. Setanartreytirnar eru ásettar í stjórasáttmála, sum skal góðkennast av Fíggjarmálaráðnum.

**Umsókn**
Tú kanst fáa meir at vita um starvið við at venda tær til Rúna Heinesen, formann í kringvarpsstýrinum á tlf. 214407 ella á teldupostadressuni runih@tsk.fo.

Umsóknir við CV, prógvum, o.t. skulu stílast til:
Kringvarp Føroya
Postboks 1299
110 Tórshavn
Att. Kringvarpsstýrið

Ella sum teldupostur til runih@tsk.fo

**Umsóknarfreistin**
**er fríggjadagin, 21. September 2018, kl.24.00.**

***Hugsjón Kringvarpsins:***

***Visjón:***
*Kringvarp Føroya skal vera fremsti mentanarberi føroyinga.*
***Misjón:***
*Kringvarpið skal ríka lív og samleika føroyinga við sendingum og tænastum, sum upplýsa, menna og undirhalda.*
***Kjarnuvirðir:***
*Trúvirði – Starvsfólk Kringvarpsins skulu vísa ábyrgd og trúfesti í síni framleiðslu, so Kringvarpsbrúkarar kunnu hava álit á Kringvarpinum.*
*Virðing – Kringvarpið skal vísa virðiliga atferð í øllum sínum virki, arbeiða fyri at varðveita føroyskt mál og mentan og virka savnandi fyri føroysku tjóðina.*
*Slóðbrótan – Kringvarpið skal vera slóðbrótandi, bjóða av og ganga á odda.*
*Professionalisma – Í Kringvarpinum skal professionalisma,engasjemang, kreativitetur, fjølbroytni og toymisandi ráða.*

KRINGVARP
FØROYA

*Kringvarp Føroya er sjálvstøðugur almennur stovnur, sum virkar óheftur av politisku skipanini, og sum verður stjórnaður av einum stýri við sjey limum. Virksemið verður fíggjað við kringvarpsgjaldi og inntøkum frá kunngerðum og spæli. Fíggjarætlanin er umleið 69 mió.kr. og umleið 80 fólk eru í føstum starvi á stovninum.*